## Oddagrein

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo



# LÆGRI LØNIR Í LØGTINGINUM

Løgtingsmaðurin Kári P. Højgaard sigur í Sosialinum mánadagin, at hann er til reiðar at fara niður í løn fyri at vísa seg sum góða fyrimynd, nú tað almenna skal spara pengar. Onnur løgtingsfólk halda somuleiðis, at hetta hevði verið eitt hóskandi stig hjá løgtinginum at tikið, og í grannalondum okkara hava politikarar skert sína egnu løn seinastu tíðina.

Tað verður ikki ein lítil lækking av lønini hjá løgtingsfólkunum, sum fær avgerandi týdning fyri búskapin ella samfelagið, men í eini slíkari lækking liggur eitt signalvirði um, at politikararnir vilja ganga á odda, nú reimin skal spennast hjá tí almenna – kanska eisini um slík uppskot tykjast populistisk.

Men tað hevur ivaleyst eisini týdning, at politikararnir, sum uttan iva fara at verða fyri atfinningum í sambandi við skerjingar og sparingar, kunnu siga, at teir eisini taka eitt tak saman við øllum hinum. Tað bøtir kanska um samvitskuna hjá teimum fólkavaldu, tá ið tað skal skerast burtur av hjá teimum tey eldru og veiku í samfelagnum. Higartil hevur tað ov ofta verið tey – og bara tey – sum hava fingið minni.

Tað eru nú liðin nógv ár, síðani lønirnar hjá politikarunum gjørdu eitt ordans lop uppeftir. Tá varð sagt, at tað skuldi betra um góðskuna á lóggávuarbeiðnum, og løgtingsfólk skuldu kunnað liva av sínum løgtingsarbeiði – og helst bara tí.



Men tað er trupult at síggja nakra broyting í hjástørvunum hjá løgtingsfólkunum síðani stóru lønarhækkingina. Fleiri tingfólk hava framvegis væl lønt størv við síðuna av sínum tingsessi, og tá ið hugt verður eftir uppmøtingini til tingfundir, kann mann ivast í, hvat av størvunum hjá onkrum tingfólki er hjástarvið.

Tað, sum hevur størri týdning enn ein súmbolsk lønarlækking hjá løgtingsfólkunum, er, at tingfólkini leggja veruliga orku og tíð í tingarbeiðið, so dygdin verður so góð sum gjørligt. Og teir pengarnir, sum eru at spara við eini lækking av løgtingsmannalønunum, kundi hóskandi farið til at styrkt umsitingina í løgtinginum, so talið á lógaruppskotum, sum verða løgd fyri tingið uttan at verða løgfrøðiliga eftirkannað, lækkaði.

**» Tað bøtir kanska um samvitskuna hjá teimum fólkavaldu**




# Sidney Lee býr á 14 fermetrum

Reality-stjørnan Sidney Lee roynir at liva eitt lív í sús og dús á reyðum løparum, forsíðum og endaleysum veitslum. Men sambært BT, sum hevur funnið sær okkurt at skriva um í hesi agurkutíðum, er tað ikki stórvegis marglæti yvir búnaðnum hjá Sidney Lee.

BT avdúkar í dag bæði eitt og annað um Sidney Lee, sum er komin fram umvegis reality-røðir í Danmark. Millum annað skrivar blaðið, at Sidney Lee ikki býr í stórari íbúð á Kongens Nytorv, sum hann hevur ført fram, men heima hjá foreldrum sínum, har hann hevur eitt kamar á 14 fermetrar.

– Eg havi onga viðmerking, segði Sidney Lee, tá ið BT hitti hann á veg heim í gjár.

Sidney Lee hevur sambært blaðnum fleiri ferðir sagt, at hann býr í einari stórari íbúð fyri nógvar milliónir krónur, sum pápi hansara skuldi havt keypt honum, men hetta fær BT ikki at passa, og tað ber ikki til at fáa uppklára, hví Sidney Lee sigur tað.

BT skrivar eisini, at fram til september í fjør búði Sidney Lee í eini íbúð í Vanløse, men hann varð tveittur út úr henni.



**» Kvinnur eisini komnar á vøllin**

DAGFINN OLSEN
MIÐLAR SÍÐA 10



**» Eg skulkaði, tá eg fekk ein kjans**

TOMMY ANDREASEN
SÍÐA 44-45

# Týskur prinsur liggur framvið

Mario Max Schaumburg Lippe er 33 ára gamal prinsur, og tá ið hann her fyri var til ein vælgerandi døgurða í London, fekk hann eygað á svensku prinsessuna Madeleine.

Sambært svenska blaðnum Expressen er týski prinsurin nú forliptur uppi í svensku prinsessuni, sum fyri kortum avlýsti brúdleypið við sjeikin hjá sær.

– Um tað veruliga passar, at hon er støk, so er hon mín dreymaprinsessa, sigur týski prinsurin við blaðið.

Fyri tveimum árum síðani var Mario at finna á forsíðunum, tí hann gekk saman við eysturríksku Natascha Kampusch, sum varð innistongd í einum kjallara í átta ár, áðrenn hon flýddi.

Sambært svenska Se & Hør dansaðu svenska prinsessan og týski prinsurin alla náttina, og Madeleine skuldi verða í góðum lag.



*Mynd: Polfoto*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo